# Blokkstuðulin fer til skattalætta

*Hækkaðu føroyingar skattin upp á sama støði sum danir, høvdu skattainntøkurnar næstan nøkta blokkstuðulin, heldur danska stjórnin*

John Johannessen



*Høgni Hoydal heldur, at nýggja roknistykkið hjá donsku stjórnini bert styrkir fullveldisætlanina*

Sambært útrokningum hjá ráðgevandi nevndini fyri Føroyar hjá danska forsætismálaráðnum, er skattatrýstið í Føroyum fallið ein fimting síðani 1993. Trýstið er fallið frá at vera á sama støði sum tað danska, ið er umleið 51 prosent, niður á 41 prosent.

Hesi tølini hevur danska blaðið Jyllands-Posten fingið fatur á frá forsætismálaráðnum á, og er tað komið til ta niðurstøðu, at føroyingar næstan ikki høvdu brúk fyri blokkstuðulinum úr Danmark, settu vit skattatrýstið upp á sama støði, sum tað danska.

Var føroyska skattatrýstið 51 prosent, hevði hetta givið føroyska samfelagnum eina økta skattainntøku á 700 til 800 milliónir krónur, og táttar hetta væl í ta upphædd á góðar 950 milliónir, danir í ár rinda Føroyum í blokkstuðuli.

Danska avísin, Jyllands-Posten, sigur seg skilja, at danska stjórnin ætlar sær at brúka roknistykkið í samráðingunum við donsku stjórnina fyri enn einaferð at sláa fast, at føroyingar gott kunnu gloyma tankan um, at blokkstuðulin kann halda fram, eftir, at fullveldisætlanin er framd í verki.

### Føroyski skatturin høgur

Í samgonguskjalinum hjá føroysku samgonguni er sligið fast, at føroyska skattatrýstið skal lækka enn meira. Tí kann ikki hugsast, at skatturin verður hækkaður fyri at fáa blokkstuðulin inn aftur.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, er ikki samdur við tølunum um, at føroyski skatturin er so nógv lægri enn tann danski. Hann vísir á, at vit í Føroyum hava nógv lægri lønarlag, enn danir hava, og harafturat hava vit nógv ymisk avgjøld. Tí heldur hann føroyska skattin kunna metast eins høgan, sum tann danska.

### Styrkir landsstýrið

Landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum heldur annars, at roknistykkið hjá forsætismálaráðnum, sum Jyllands-Posturin hevur avdúkað, bert styrkir støðuna hjá føroyingum í fullveldismálinum.

– Nú dugi eg ikki at síggja nakrar grundgevingar yvirhøvur fyri, at vit ikki skulu fáa sjálvræði sum skjótast, sigur Høgni Hoydal.

Hesa útsøgn undirbyggir hann við, at vísa á, at júst tað, at danir viga føroyska skattatrýstið upp ímóti blokkstuðulinum vísir, at danir kunnu fara at blanda seg upp í, hvussu nógv føroyingar skulu gjalda í skatti framyvir og so framvegis, heldur verandi ríkisrættarliga støða fram.

Høgni Hoydal er vísur í, at vit fáa stykt føroyska búskapin munandi, tá vit hava fingið fult ræði og eru sloppin av við blokkstuðulin. Hann er eisini sannførdur um, at hetta fer at merkja, at samfelagið kann veita borgarunum tryggar og góðar tænastur, uttan, at tað fer at merkja hægri skattir.



## Tekur álopini so hvørt

John Johannessen

Hóast Jóannes Eidesgaard umboðar Føroyar og allar føroyingar á fólkatingi, ætlar hann sær í dag at umboða Javnaðarflokkin og tey sjónarmið flokkurin hevur, undir aðalorðaskiftinum um ríkisrættarligu støðuna á fólkatingi í dag.

Jóannes Eidesgaard heldur nevniliga, at samgongan seinastu tíðina í so stóran mun hevur fingið ført síni sjónarmið um fullveldismálið fram í donskum miðlum og fyri danska fólkatinginum, at hann nú eigur at vísa á, at allir føroyingar ikki hava somu meining, sum landsstýrið.

– Eg ætli mær at gera greitt, hvussu Javnaðarflokkurin og eg sjálvur halda spurningurin um ríkisrættarligu støðuna kann loysast, sigur Jóannes Eidesgaard.

Føroyski fólkatingslimurin ásannar, at hann á fólkatingi vanliga er umboð fyri allar Føroyar og skal verja føroysk áhugamál mótvegis álopum frá donskum politikarum. Men hann kennir seg vísan í, at hin føroyski fólkatingslimurin, Óli Breckmann, ið eisini er limur í føroysku samgonguni, fer at tosa søk samgongunnar. Tí kennir hann tað, sum sína skyldu at greiða frá støðuni hjá teimum føroyingunum, ið ikki taka undir við samgonguni.

Men Jóannes Eidesgaard æltlar sær kortini ikki at lata møgulig órímilig álop á føroyingar frá donskum politikarum at standa ósvarað. Hvat hann svarar til slík álop, fer hann at taka støðu til, tá tey koma.

# Runavík umhugsar íbúðir

*Á tekniborðinum hjá Runavíkar býráð verður arbeitt við ætlanum at byggja borgarunum smærri íbúðir, sum teir kunnu flyta í, tá ið húsini gerast ov stór*

Dánjal Højgaard



*Á hesum økinum omanfyri Ellis- og Røktarheimið í Runavík, verða íbúðir nú kanska bygdar til borgararnar í kommununi*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tørvur er á smærri íbúðum í Runavíkar kommunu til eldri og yngri fólk, sum ikki hava hug, ráð ella orku at sita í stórum og dýrum húsum.

Tað heldur býráðsformaðurin í Runavíkar Kommunu, Jákup Lamhauge, nú býráðsumsitingin umhugsar at byggja smærri íbúðir í kommununi.

### Privat byggja

Tað verður kortini ikki Runavíkar býrað, sum fer at byggja og selja íbúðir til býarbørnini.

Gerst ætlanin veruleiki verður kommunar lutur avmarkaður til at útvega byggiøki og gera tað byggibúgvið, sigur Jákup Lamhauge. Síðani kunnu onnur byggja og selja borgarunum íbúðirnar. Eitt økið er til taks omanfyri Ellis- og Røktarheimið í Runavík, sum hevði hóskað væl til endamálið, sigur býráðsformaðurin.

Jákup Lamhauge kundi hugsað sær, at byrjað varð í smáum. Í fyrsta umfari kundu verið bygdar einar 6-8 íbúðir á einar 70 fermetrar. Vísir tað seg, at áhugi er fyri fleiri íbúðum, ber til at byggja fleiri afturat, sigur hann.

### Nógv einsamøll

Eldraárið í fjør kom fram, at nógvar einkjur, einkjumenn og onnur støk, sum sita í ov stórum húsum, eru í Runavíkar Kommunu. Hildið varð, at kommunan átti at virka fyri, at hesi fólk kundu fáa eina hóskandi íbúð ístaðin. Samstundis hevur onkur byggiharri vent sær til kommuna og sýnt áhuga fyri at byggja íbúðir.

Fyribils er talan um tankar, sum býráðsumsitingin hevur arbeitt við á tekniborðinum. Men hugskotið er tiltalandi, sigur býráðsformaðurin, og tekur sína egnu støðu sum eitt dømi:

-Vit sita tveyeini í húsum, ið eru tilsamans 200 fermetrar til víddar. Børnini eru farin heimanífrá, so tað er púra óneyðugt við so nógvum plássi, sigur Jákup Lamhauge.

Ætlanin er kortini ikki at marka íbúðirnar til nakran ávísan aldursbólk. Eisini ungfólk skulu hava møguleikan at keypa sær eina íbúð áðrenn tey fáa børn og fara at byggja sær eini hús, heldur býráðsformaðurin.



# Føroyingar fáa durðafjórðingin

*Føroyingar kunnu í mesta lagi vænta sær skiftistíð á trý til fýra ár. Danskir politikarar ætla sær ikki at lata seg ávirka av kunnandi fundinum hjá landsstýrinum*

John Johannessen

Landsstýrið hevði í gjár kunnandi fund fyri fólkatinginum um fullveldisætlanina. Endmálið við fundinum var at fáa danskir politikarar at skilja fullveldisætlan landsstýrisins áðrenn aðalorðaskiftið, sum í dag er á fólkatingi um ríkisrættarligu støðu Føroya.

Men landsstýrið skal ikki rokna við at hava fingið nógv burturúr kunnandi fundinum. Sambært danska blaðnum, Jyllands-Posten, ætla danskir fólkatingslimir ikki at bakka ein tumma í teirra føstu støðu til fullveldismálið.

Jyllands-Posten skrivaði í gjár, at greiðu boðini frá breiða politiksa meirilutanum á fólkatingi er, at við fullum sjálvræði á politiska økinum fylgir eisini full ábyrgd á fíggjarliga økinum. Tí er politiski meirilutin samdur um, at blokkstuðulin til Føroya skal fella burtur eftir trimum til fýra árum. Sostætt kemur ein skiftistíð, ið er longri enn trý til fýra ár ikki upp á tal.

Danska avísin kallar kunnandi fundin hjá landsstýrinum fyri ein umgang av seriøsum lobbyarbeiði.

### Kann læsa samráðingarnar

Aðalorðaskiftið á fólkatingi í dag kann fáa ógvusligar avleiðingar fyri víðari samráðingarnar um ríkisrættarligu støðuna. Møguleiki er nevniliga fyri, at fundurin í morgin ger eina samtykt, ið bindir donsku stjórnina til at halda seg innan fyri ávísar rammur undir samráðingunum.

Møguleiki er nevniliga fyri, at fólkatingið eftir aðalorðaskiftið í dag ger eina samtykt, ið sigur, at búskaparliga skiftistíðin ikki má vera longri enn eitt ávíst áramál, somuleiðis sum upphæddin heldur ikki má vera størri enn eitt vist.

Hetta kann gera, at lítið og einki er at samráðast um. Tí danska stjórnin er bundin at samtyktini hjá fólkatinginum.

### Vænta spaka samtykt

Kortini vænta danskir eygleiðarar ikki, at niðurstøðan av aðalorðaskiftinum fer at verða so ógvuslig. Sum skilst fer ein ógvuliga breiður meiriluti á fólkatingi at samtykkja, at ein sersøk Føroyanevnd skal veljast, ið skal hava eftirlit við samráðingunum og ráðgeva donsku stjórnini undir samráðingunum.

Partur av niðurstøðuni fer eisini, sambært donsku eygleiðarunum, at verða, at Føroya landsstýri sjálvt hevur valt at fara undir fullveldissamráðingarnar, og at landsstýrið tískil eisini má skilja, at tað má taka við teimum fíggjarligu avleiðingunum, hetta fær.

Men, sum skilst, fer niðurstøðan ikki at binda stjórnina til eina ávísa fíggjarliga skiftistíð. Hetta verður mett sum ein samráðingarspurningur, hóast bæði andstøða og stjórn eru samd um, at skiftistíðin ikki skal vera longur enn eini trý til fýra ár.



*Donsku fólkatingsumboðini høvdu longu undan kunnandi fundinum gjørt av ikki at lata seg ávirka av landsstýrinum.*
*Mynd: Føroyska Tíðindastovan*

## Fordómarnir skulu burtur

John Johannessen

Føroyska fólkatingsumboðið, Óli Breckmann, ið eisini er limur í løgtingssamgonguni, fer undir aðalorðaskiftinum á fólkatingi í dag at greiða frá fullveldisætlanini úr sjónarhorni landsstýrisins.

Hóast Óli Breckmann ásannar, at hann á fólkatingi eigur at umboða allar føroyingar og ikki bert hugsan føroysku samgongunnar, fer heldur hann seg tæna føroyska fólkinum best við at greiða frá fullveldisætlanini sum limur í føroysku samgonguni undir aðalorðaskiftinum í dag.

– Eg kann ikki fornokta politikkin hjá samgonguni, og harafturat eri eg sannførdur um, at samráðingarúrslitið millum landsstýrið og donsku stjórnina kann fáa undirtøku millum tveir triðjingar av føroyska fólkinum. Tí fari eg partvís at tala landsstýrisins søk í dag, sigur fólkafloksmaðurin, Óli Breckmann.

Føroyski fólkatingslimurin sigur, at hann ætlar sær at royna at fáa skúgvað allar teir mongu fordómar og allar tær mongu mytur um fullveldismálið burt, so danir fara at skilja, hvat tað er, føroyingar veruliga vilja. Hetta, heldur hann, kann geva samráðingunum ein rímuligan kjans at koma aftur á eitt rímuligt støði.

Óli Breckmann sigur seg eisini ætla at vísa dønum á, at tað ikki passar, at Føroyar eru ein útreiðsla fyri danir

– Eg vóni, at fullveldismálið aftur fer at fáa veruliga viðgerð, nú Nyrup hevur fingið møguleikan at styrkja seg politiskt í Danmark við at leggja hart út móti føroyingum undir fyrsta samráðingarfundinum herfyri, sigur Óli Breckmann, ið ætlar sær at vera spakur undir orðaskiftinum í dag. Men koma ógvusligar ákærur móti føroyingum, roknar hann ikki við at hann klárar at lata vera við at geyla eitt sindur.


GSM frá Telebúðunum

...so ert tú altíð har, tú skalt vera!



Ericsson T10s
PRÍSUR VIÐ MVG 1990,-
Fartelefonin til tín, sum fegin vil hava ta nýggjastu tøknina, men sum eisini fegin vil hava eina snøgga bíliga telefon, mann leggur merki til.



Ericsson T28s
PRÍSUR VIÐ MVG 5295,-
Er ikki bert minsta fartelefonin, ið Ericsson hevur á marknaðinum. Hon er eisini nýskapandi við hópin av hentleikum m.a. vibrator, raddarstýring og profil-funktiónir.



Nokia 3210
PRÍSUR VIÐ MVG 2095,-
Hóast telefonin er lítil og snøgg, hevur hon ein stóran skíggja við stórari upploysn, sum gevur góðan mótlit og týðiligar bókstavar, ið eru lættir at lesa.



Nokia 8210
PRÍSUR VIÐ MVG 5390,-
Fartelefonin sum lurtar, tá tú tosar. Tú kanst goyma upp til 8 nøvn, sum tú kanst ringja til og sum verða styrd av røddini hjá tær. Er ein av léttastu telefonunum hjá Nokia.



Nokia 8850
PRÍSUR VIÐ MVG 6795,-
Uppkøllini kunnu stýrast av røddini hjá tær. Eisini er telefonin skjót at nýta, tá tú skalt skriva tekstboð, tí telefonin minnist, hvørji orð tú fyrr hevur skrivað. Hevur innbygda antennu og góða ljóðgóðsku.



Siemens C25
PRÍSUR VIÐ MVG 1695,-
Sera lítil, snøgg og bílig telefon, sum bert vigar 135 g. Er tilbúgvin í upp til 100 tímar og hevur upp til 5 tíma talutíð.



Siemens S25
PRÍSUR VIÐ MVG 2895,-
Hóast telefonin er lítil, hevur hon hópin av eyka hentleikum. Tær tørvar ikki eyka kaðal ella aðrar tvørligar innleggingar – við S25 kanst tú senda og fáa teldupost o.a. við einum infrareyðum interface.



Motorola V3688
PRÍSUR VIÐ MVG 5895,-
Telefonin hevur hópin av hentleikum, m.a. vibrator, sum ger, at tað ikki er neyðugt at órógva onnur, tá telefonin ringir.

petur & petur • 320870

*Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum og útseldum vørum.*

TELEBÚÐIN

Tórshavn 31 70 10 • Tvøroyri 37 10 00 • Søldarfjørður 44 10 00
Norðurstreymoy 42 10 00 • Klaksvík 45 74 88 • Sandur 36 10 00 • Miðvágur 33 20 00